# UNDIRLÍVSKRABBI

▸ GÓÐ RÁÐ OG VEGLEIÐING TIL KVINNUR VIÐ KRABBAMEINI Í UNDIRLÍVI

krabbameinsfelagið

# EIN HJÁLPANDI HOND

Krabbamein hevur ofta við sær broytingar, og kunnu hesar raka sera meint. Nýggjar óvanligar støður taka seg upp, og nógvir tankar og kenslur eru at stríðast við. Bæði tú og tíni avvarðandi kunnu kenna tykkum máttleys og einsamøll.

Undirlívsbólkurin er bólkur hjá Krabbameinsfelagnum og er fyri kvinnur, ið hava ella hava havt krabbamein í undirlívi.  Kvinnurnar í bólkinum hava sjálvar havt krabbamein í undirlívi og eru vornar frískar aftur.

Endamálið við bólkinum er at ráðgeva og stuðla kvinnum, sum fáa staðfest krabbamein í undirlívi, býta tankar og kenslur og í fullum trúnaði práta um tað, ið er tungt at bera.

Tær kenna skelkin, og spurningar um millum annað útlit, viðgerð, hvat tú sigur tínum næstu og, hvussu tað er at fara uttanlands í viðgerð. Eisini eru tað fleiri, sum hava eftirárin orsakað av viðgerðini og vita tær, hvussu hetta best verður linnað.

Við hesi vitan og royndum ynskja kvinnurnar í Undirlívsbólkinum at stuðla og hjálpa øðrum kvinnum í líknandi støðu út frá medmenniskjaligum grundarlagi. Er talan um fakligar spurningar, verður víst til fakfólk á økinum.

# UNDIRLÍVSKRABBI

Á hvørjum ári fáa umleið 20 føroyskar kvinnur staðfest undirlívskrabba. Umleið helmingurin av teimum fáa staðfest lívmóðirhálskrabba. Væntandi verða færri tilburðir av lívmóðirhálskrabba komandi árini, nú kvinnur upp til 27 ára aldur kunnu koppsetast fyri HPV-virus.

Kvinnur kunnu fáa krabbamein í eggjastokkarnar, eggjaleiðararnar, lívmóðirina, lívmóðirhálsin, skeiðina og kynslippurnar.

Til ber at lesa meira um ymsu sløgini av undirlívskrabba á www.cancer.dk.

Á ráðgevingarstovuni hjá Krabbameinsfelagnum fært tú viðkomandi faldarar um kvinnusjúkur og onnur viðkomandi evnir.

Ráðgevingarstovan hevur telefontíð hvønn gerðandisdag kl. 13.00-15.00

# GER VART VIÐ TEG!

Tá ið tú fært staðfest krabbamein í undirlívi er vanligt at hava nógvar spurningar. Tørvurin á upplýsing, vitan, stuðuli og hjálp er stórur.

Tað er gott at fáa góða og nógva hjálp frá familju og vinum. Okkara royndir vísa, at tað harafturat hjálpir at hitta aðrar kvinnur, sum hava kent sjúkuna á egnum kroppi.

Samband fæst við Undirlívsbólkin umvegis ráðgevingarstovuna hjá Krabbameinsfelagum,
tlf. 317959, ella send okkum ein teldupost:
kmf@krabbamein.fo

Ger tí vart við teg og fá eitt prát við eina av hesum kvinnum. Allar samtalur eru í trúnaði. Tú kanst tekna teg til hugnaløtu, fyrilestur ella annað tiltak hjá bólkinum.

Á ráðgevingarstovuni ber eisini til at fáa prát við sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava hollar royndir og vitan um krabbamein, og sum hava terapeutiska eftirútbúgving.

## TEKNA TEG SUM LIM

Inntøkurnar hjá Krabbameinsfelagnum eru limagjøld, lutaseðlasøla, gávur frá einstaklingum, stovnum, fyritøkum og feløgum umframt testamentariskar gávur. Felagið fær ongan almennan stuðul.

Ynskir tú at gerast limur ella stuðla felagnum, kanst tú venda tær til okkum umvegis heimasíðuna www.krabbamein.fo, ringja ella senda teldupost

---

## KRABBAMEINSFELAGIÐ

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO 110 Tórshavn
Tel. 31 79 59
Teldupostur: kmf@krabbamein.fo
Heimasíða: www.krabbamein.fo

## OPIÐ ER MÁNADAG TIL FRÍGGJADAG.

Ring og fá eina avtalu. Telefontíð er frá kl. 13.00 til 15.00.

Les meira um evnið á www.cancer.dk

---

*Heldin er búmerkið hjá Krabbameinsfelagnum og ímyndar virðisgrundarlagið hjá felagnum. Heldin er gamalt føroyskt hjálpar-amboð, ið varð nýtt til at bera størri byrðar av hoyggi við.*

*Heldin bæði knýtir saman og loysir eina byrðu aftur. Júst soleiðis ynskir Krabbameinsfelagið at hjálpa tær, ið er ella hevur verið sjúk/-ur av krabbameini, so tunga byrðan gerst lættari hjá tær og tínum at bera.*

SENDISTOVAN